**Trygdarmiðstøðin**
Bøgøta 38
Postsmoga 297
Fo-700 Klaksvík Tlf +298 455882
Fax +298 457197
www.seasafe.fo

## Skeiðlærari til Trygdarmiðstøðina

Trygdarmiðstøðin søkir eftir fólki at undirvísa í trygd á sjónum at byrja skjótast til ber, men vit bíða fegin eftir tí rætta.

**Starvsinnihald:**
- Undirvísa í trygd á sjónum. Undirvísingin fevnir um bæði ástøðiliga frálæru og venjingar í at nýta bjargingar – og eldsløkkiútgerð v.m.
- Vera við til at menna og gera frálærutilfar í samsvar við altjóða krøv og tørvin hjá vinnunni.
- Vera við til vanligt viðlíkahaldsarbeiði herundir ISO-skipanina á venjingarstøðini og aðrar fyrifallandi uppgávur.

**Førleikakrøv:**
*Umsøkjari skal hava*
- Lokið prógv sum navigatørur ella sum maskinmeistari við 3 ára útbúgving, ella hava drúgvar starvsroyndir við neyðugari eftirútbúgving innan trygd umborð á skipum, boripallum ella flogferðslu, ið kunnu javnsetast við tað.
- Fyrimunur er, um tann ið søkir starvið, hevur royndir í undirvísing frá t.d. sjóvinnu, frálanda ella loftferðslu.
- Kavaraprógv ella aldur og heilsu til at taka prógv sum kavari
- Góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt og góð samstarvsevni

Tann, ið settur verður, skal vera til reiðar at taka ymiskar útbúgvingar og eftirútbúgvingar, sum eru viðkomandi fyri starvið.

**Setanarviðurskiftir :**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Setanarøkið fevnir um Fiskimálaraðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini.

Tænastustaðurin er í løtuni í Klaksvík.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í virkisøkinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknarfreistin er 27. september 2010 kl 16.00

Trygdarmiðstøðin
Bøgøta 38
Postsmoga 297
Fo-700 Klaksvík Tlf +298 455882 Fax +298 457197
www.seasafe.fo

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli skullu sendast til:

**Trygdarmiðstøðin**
Postsmoga 297 · FO 700 Klaksvík · Att: Skeiðlærari.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Marius Magnusson leiðara á tlf 455882
ella umvegis teldupost;
marius.magnusson@seasafe.fo

Lýsingin sæst eisini á :
www.seasafe.fo og www.fisk.fo

RUNAVÍKAR KOMMUNA

**SØKIR EFTIR:**

## Pedagogi til Barnagarðin á Mýrunum

**Søkt verður eftir:**
1 pedagogi 20/25t um vikuna, til barnagarðstovu

**Førleikakrøv:**
vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru nýhugsandi og ígongdsetandi og eru opin, jalig, duga at veita umsorgan og hava góð samstarvsevnir. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn.

**Vit bjóða tær:**
eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum í dagligdegnum, har tú blívur ein partur av okkara breiða starvsfólkahópi, har tað námsfrøðiliga arbeiðið verður raðfest høgt. Dentur verður lagdur á, at møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.

Starvið verður sett, sum skjótast ella eftir nærri avtalu. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Eyðnu Norðfoss, leiðara ella Jastrid Weihe, varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. Sept. 2010, kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26
Postrúm 139
FO-610 Saltangará

*Í Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur, 3 barnagarðsstovur og 1 stova til børn við serligum tørvi.*
*Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felags/rørslurúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið.*



## BMW 318 TDS til sølu

Ein svartur BMW 318 TDS (diesel) er til sølu fyri 20.000 krónur.

Bilurin er skrásettur fyrstu ferð hin 11. juni 1996 og er í góðum standi

**Áhugaði ringið tel: 223369**

RUNAVÍKAR KOMMUNA

**SØKIR EFTIR NÁMSFRØÐINGUM TIL NÝGGJU STOVNARNAR**

## Námsfrøðingar til Barnahúsið Sellin og Náttúrubarnagarðin Sóljuhjarta

**Barnahúsið Sellin**
1 námsfrøðing á 30 t. um vikuna, til barnagarðstovu. Starvið verður sett, sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

Námsfrøðingar sum gerast lidnir fyrst í komandi árið, eru eisni vælkomnir at søkja starvið.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Nancy Poulsen, leiðara. Tlf. 21 22 52 ella 66 71 60

**Náttúrubarnagarðin Sóljuhjarta**
1 námsfrøðing á 30 t. um vikuna til barnagarðsstovu. Starvið er eitt fyribilsstarv við setan frá 27. sept. 2010 fram til 1. juni 2011

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Káru Løkin, leiðara. Tlf. 21 43 06 ella 66 71 70

**Førleikakrøv:**
vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru nýhugsandi og ígongdsetandi og eru opin, jalig, duga at veita umsorgan og hava góð samstarvsevnir. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn. Vit ynskja eisini at tú sært allar teir møguleikar ið náttúran hevur, og gert brúk av teimum í dagliga arbeiðinum.

Báðir stovnarnir er nýggir, og tú sum starvsfólk er við til at mynda teir nýggju stovnarnar.

**Lønin:**
er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Søk starvið:**

Við at senda umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum til Runavíkar kommununi í seinasta lagi mánadagin 15. Sept. 2010, kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26
Postrúm 139
FO-610 Saltangará